Kunngerðablaðið A

2009 Hefti 2

ISSN 0907-905X

Nr. 2 13. januar 2009

**Kunngerð um broyting í kunngerð um gjøld fyri eftirlit v.m. hjá Arbeiðseftirlitinum**

**§ 1**

Í kunngerð nr. 121 frá 21. november 2005 um gjøld fyri eftirlit v.m. hjá Arbeiðseftirlitinum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 3 verður gjaldið fyri eftirlit við fólka- og góðslyftum: „kr. 2.200,-“ broytt til: „kr. 2.530,-“.
2) Í § 3 verður gjaldið fyri eftirlit við góðslyftum og lyftum til rørslutarnað v.m. „kr. 1.000,-“ broytt til: „kr. 1.150,-“.
3) Í § 3 verður gjaldið fyri eftirlit við lyftiútgerð v.m. „kr. 1.760,-“ broytt til: „kr. 2.000,-“.
4) Í § 4, nr. 1 verður „kr. 1.760,-“ broytt til: „kr. 2.024,- árliga“.
5) Í § 4, nr. 2 verður „kr. 2.100,-“ broytt til: „kr. 2.415,- árliga“.
6) Í § 4, nr. 3 verður „kr. 2.500,-“ broytt til: „kr. 2.875,- árliga“.
7) Í § 4, nr. 4 verður „kr. 2.800,-“ broytt til: „kr. 3.220,- árliga“.
8) Í § 4, nr. 6 verður „kr. 1.800,-“ broytt til: „kr. 2.000,- árliga“.
9) Í § 4, nr. 7 verður „kr. 1.300,“ broytt til: „kr. 1.500,- árliga“.
10) Í § 4, nr. 8 verður „kr. 1.800,-“ broytt til: „kr. 2.070,- árliga“.
11) Í § 5 verður gjaldið fyri at útskriva prógv (nýtt) „kr. 800,-“ broytt til: „kr. 1.000,-“.
12) Í § 5 verður gjaldið fyri endurútskrivað prógv „kr. 300,-“ broytt til: „kr. 350,-“.
13) Í § 5 verður gjaldið fyri umbýti av prógvi „kr. 2400,-“ broytt til: „kr. 1000,-“.
14) Í § 6 verður gjaldið fyri eftirlit við trýstílati „kr.1.700,-“ broytt til: „kr. 1.955,-“.
15) Í § 6 verður gjaldið fyri eftirlit við fylgjandi trýstíløtum „kr. 700,-“ broytt til: „kr. 805,-“.
16) Í § 6 verður gjaldið fyri eftirlit við uppsetan av rørskipanum „kr. 2.800,-“ broytt til: „kr. 3.220,“.
17) Í § 7 verður gjaldið fyri góðkenning av sakkønum virki „kr. 2.900,-“ broytt til: „kr. 3.300,- árliga“.
18) Í § 8 verður gjaldið fyri góðkenning av spreingievnisgoymslu „kr. 2.500,-“ broytt til: „kr. 2.875,“.
19) Í § 9 verður gjaldið fyri eftirlit av trukkum „kr. 850,-“ broytt til: „kr. 1.000,- árliga“.
20) Í § 10 verður gjaldið fyri ummæli um innrætting av føstum arbeiðsplássum „kr. 950,-“ broytt til: „kr. 2.500,-“.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Vinnumálaráðið, 12. januar 2009

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/Arne Poulsen (sign.)

**Kunngerð**
**um**
**Dissiplinernevnd fyri løggildar og skrásettar grannskoðarar**

Við heimild í § 19, stk. 1 og 5 í løgtingslóg nr. 116 frá 11. desember 2007 um løggildar og skrásettar grannskoðarar (grannskoðaralógin) verður ásett:

## Kapittul 1
## Málsræði og bygnaður hjá Dissiplinernevndini

**§ 1.** Dissiplinernevndin viðger klagur um, at løggildur ella skrásettur grannskoðari í sambandi við arbeiði sítt sambært § 1, stk. 2 í grannskoðaralógini, hevur sett til síðis tær skyldur, ið hoyra starvinum til. Mál, sum er lagt fyri Dissiplinernevndina eftir, at grannskoðaralógin er komin í gildi, men sum snýr seg um brot á Løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildar grannskoðarar ella Løgtingslóg nr. 119 frá 21. mai 1993 um skrásettar grannskoðarar, verður viðgjørt í Dissiplinernevndini eftir teimum reglum, sum vóru galdandi, tá brotið fór fram.
*Stk. 2.* Klagur um samsýning til grannskoðara og felagslig mál kunnu ikki leggjast fyri Dissiplinernevndina.

**§ 2.** Í Dissiplinernevndini er ein formaður, sum er løgfrøðingur, og 8 nevndarlimir, harav 2 eru løggildir grannskoðarar, 2 eru skrásettir grannskoðarar, og 4 eru umboðandi roknskaparbrúkararnar. Skráseting Føroya kann tilnevna ein ella fleiri løgfrøðingar sum næstformenn.
*Stk. 2.* Fyri hvønn nevndarlim kann verða valdur ein varalimur.
*Stk. 3.* Skráseting Føroya tilnevnir formannin og nevndarlimirnar fyri fýra ár í senn.
*Stk. 4.* Formaðurin avger út frá einari meting í hvørjum einstøkum máli, hvussu nógvir og hvørjir nevndarlimir skulu luttaka, tá eitt mál verður viðgjørt. Tað skulu altíð vera líka nógvir grannskoðarar sum umboð fyri roknskaparbrúkararnar.
*Stk. 5.* Tá nevndin viðger mál viðvíkjandi løggildum grannskoðara, skal í minsta lagi 1 løggildur grannskoðari og 1 umboð fyri roknskaparbrúkararnar luttaka í nevndini. Tá nevndin viðger mál um skrásettan grannskoðara, skal somuleiðis í minsta lagi 1 skrásettur grannskoðari og 1 umboð fyri roknskaparbrúkararnar luttaka. Hetta er ikki galdandi í teimum málum, har formaðurin sambært § 7 tekur avgerð einsamallur. Í málum, har tað kann koma upp á tal at taka aftur tilnevningina sum løggildur ella skrásettur grannskoðari sambært § 20, stk. 2 grannskoðaralógini, skulu, umframt formannin, í minsta lagi luttaka 2 løggildir ávíkavist 2 skrásettir grannskoðarar og tilsvarandi tal av limum umboðandi roknskaparbrúkaran.

**§ 3.** Formaðurin ella nevndarlimir mugu ikki vera við í viðgerðini av einum máli, um viðkomandi eftir reglunum í rættargangslógini hevði verið ógegnigur sum dómari.
*Stk. 2.* Formaðurin og nevndarlimir hava skyldu til at boða nevndini frá um umstøður, ið kunnu hava ógegni við sær, sbrt. stk. 1.
*Stk. 3.* Ivamál um gegni eiga so vítt gjørligt at verða tikin upp, áðrenn málið verður tikið til nevndarviðgerðar.
*Stk. 4.* Dissiplinernevndin avger, um ein limur kann vera við í viðgerðini av einum máli.

**§ 4.** Formaðurin leggur arbeiðið hjá Dissiplinernevndini til rættis.
*Stk. 2.* Formaðurin ásetir tíð og stað fyri fundin, og hevur ábyrgd av fundarskrá og at kalla inn til fundar. Er ein fundur almennur
sambært § 9, stk. 3, skal hetta verða kunngjørt í minsta lagi 3 dagar frammanundan við tilskilan um tíð og stað fyri fundin.
*Stk. 3.* Í sambandi við fundir í nevndini verður fundarbók skrivað, har tíð og stað fyri fundin verður tilskilað, um fundurin hevur verið almennur, hvørjir limir hava luttikið og nøvnini á teimum, sum hava verið til staðar sum partar, umboðandi partarnar ella sum hjálparfólk. Formaðurin avger annars í hvørjum einstøkum máli, hvat kemur í fundarbókina.
*Stk. 4.* Formaðurin leiðir fundirnar í nevndini.
*Stk. 5.* Formaðurin skal syrgja fyri, at málini verða viðgjørd skjótt.
*Stk. 6.* Formaðurin tekur avgerð, hvussu málini verða býtt millum formannin og næstformannin. Næstformaðurin røkir í teimum málum, sum formaðurin hevur givið honum, tær heimildir, ið við hesi kunngerð eru givnar formanninum.

## Kapittul 2
## Hvussu mál verða fyrireikað

**§ 5.** Klaga skal vera skrivlig og sendast til Dissiplinernevndin, c/o Skráseting Føroya, Postboks 264, 110 Tórshavn.
*Stk. 2.* Klagur skulu innihalda eina frágreiðing um tær umstøður, ið klagarin ynskir Dissiplinernevndina at viðgera. Klaga skal vera latin nevndini í seinasta lagi 5 ár eftir, at tað vansketni, ið klagan viðvíkur, er endað.
*Stk. 3.* Við klaguni skal fylgja eitt gjald áljóðandi 500 kr. Verður ikki goldið beinanvegin, ásetur formaðurin eina gjaldsfreist, og verður klagan ikki viðgjørd, um gjaldið ikki er goldið innan hesa freist.

**§ 6.** Løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, við seinni broytingum og Løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg eru galdandi fyri virksemi nevndarinnar.

**§ 7.** Um ein klaga ikki kemur undir virkisøkið hjá nevndini, vísur formaðurin hana frá sær, herundir klagum frá persónum, sum ikki hava rættarligan áhuga í teimum viðurskiftum, ið klagan viðvíkur, og klagum, ið frammanundan eyðsýnt verða mettar ógrundaðar.

**§ 8.** Dissiplinernevndin skal senda avrit av klaguni við møguligum fylgiskjølum til klagaða við áheitan um at koma við viðmerkingum, innan eina nærri ásetta freist. Samstundis skal klagaði hava fráboðan um, at viðkomandi hevur rætt til at møta í nevndini við einum umboðsmanni, t.d. einum advokati, og at klagan kann verða viðgjørd á fyriliggjandi grundarlagi, um klagaði ikki kemur við fleiri upplýsingum um málið.
*Stk. 2.* Úttalilsi frá klagaða við møguligum fylgiskjølum verða løgd fyri klagaran. Metir formaðurin tað verða neyðugt, skulu partarnir við einari ávísari freist hava møguleika at koma við fleiri viðmerkingum til málið.
*Stk. 3.* Formaðurin syrgir fyri, at neyðugu upplýsingarnar fyri at viðgera klaguna eru fingnar til vega, og at tær neyðugu kanningarnar eru gjørdar. Til eina og hvørja tíð undir viðgerðini av málinum kunnu fleiri upplýsingar verða innheintaðar.
*Stk. 4.* Formaðurin syrgir fyri, at partarnir fáa innlit í upplýsingar frá mótpartinum, sum verða mettar at hava týdning fyri avgerðina í málinum, uttan so, at avgerandi atlit til almenn ella privat áhugamál tala ímóti hesum, herundir vinnu- og fíggjarviðurskifti hjá viðskiftafólki.

## Kapittul 3
## Avgerðin í málinum

**§ 9.** Partarnir í málinum hava rætt til at møta í Dissiplinernevndini og at leggja fram frágreiðing fyri nevndina.
*Stk. 2.* Formaðurin kann loyva, at aðrir persónar verða kallaðir inn fyri at leggja fram frágreiðing fyri nevndina.
*Stk. 3.* Fundir í nevndini eru ikki almennir. Formaðurin kann eftir ynski frá pørtunum loyva, at almenningurin fær høvi til at koma á fund í nevndini. Hetta er tó ikki galdandi í teimum førum, har tað fyri onkran kann hava óneyðugar vansar við sær, m.a. tí, at handilsella rakstrarloyndarmál harvið verða avdúkað.

**§ 10.** Um hvørgin partur ynskir at møta í nevndini, og formaðurin og nevndarlimirnir eru samdir um framferðarháttin, kann nevndin viðgera málið skrivliga.

**§ 11.** Avgerðir hjá nevndini verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta.
*Stk. 2.* Avgerðir skulu grundgevast, og er avgerðin ikki einmælt samtykt, skal avgerðin lýsa sjónarmið minnilutans.
*Stk. 3.* Avgerðir hjá Dissiplinernevndini kunnu ikki leggjast fyri annan fyrisitingarligan myndugleika.

## Kapittul 4
## Almannakunngerð og frágreiðing v.m.

**§ 12.** Formaðurin skal undirskriva avgerðir hjá Dissiplinernevndini, og tær verða skrivaðar í eina skipaða fundarbók.
*Stk. 2.* Avgerðir hjá nevndini verða sendar pørtunum í málinum, Felagnum fyri løggildar grannskoðarar, Felagnum fyri skrásettar grannskoðarar og til Skráseting Føroya.
*Stk. 3.* Dissiplinernevndin kann velja at almannakunngera eina avgerð. Ynskir klagaði, at avgerðin verður almannakunngjørd, eigur hetta at verða gingið á møti.
*Stk. 4.* Fær klagarin heilt ella partvís viðhald, kann Dissiplinernevndin ella formaðurin vegna nevndina taka avgerð um, at inngoldna gjaldið sambært § 5, stk. 3 verður afturgoldið heilt ella lutvíst. Tað sama er galdandi, tá klagur ikki verða tiknar upp til viðgerðar, sbr. § 7, stk. 1.

**§ 13.** Dissiplinernevndin útgevur eina árliga frágreiðing um sítt virksemi.

**§ 14.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Vinnumálaráðið, 13. januar 2009

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/Arne Poulsen (sign.)

Nr. 4 13. januar 2009

**Kunngerð**
**um**
**starvsskipan fyri Grannskoðaraeftirlitið**

Við heimild í § 15, stk. 1 í løgtingslóg nr. 116 frá 11. desember 2007 um løggildar og skrásettar grannskoðarar (grannskoðaralógin) verður ásett:

**Kapittul 1**
**Limir í og skrivstova hjá Grannskoðaraeftirlitinum**

**§ 1.** Grannskoðaraeftirlitið hevur 1 formann og 8 aðrar limir. Tveir limir skulu vera løggildir grannskoðarar, 2 limir skulu vera skrásettir grannskoðarar og 4 skulu umboða roknskaparbrúkararnar. Hvørki formaðurin ella umboðini fyri roknskaparbrúkararnar kunnu vera í starvi hjá ella reka grannskoðanarvirki saman við løggildum ella skrásettum grannskoðara.
*Stk. 2.* Skráseting Føroya tilnevnir formannin og limirnar fyri í mesta lagi eitt 4 ára tíðarskeið hvørja ferð. Limirnir kunnu verða tilnevndir aftur, tá ið hetta tíðarskeiðið er farið.

**§ 2.** Skráseting Føroya, Postboks 264, 110 Tórshavn (skr@skraseting.fo) er skrivstova hjá Grannskoðaraeftirlitinum.

**Kapittul 2**
**Heimildir**

**§ 3.** Grannskoðaraeftirlitið røkjur tær uppgávur viðvíkjandi góðskueftirliti við løggildum og skrásettum grannskoðarum og grannskoðanarvirkjum, sum ásett í kapitli 9 í grannskoðaralógini.

**§ 4.** Formaðurin í Grannskoðaraeftirlitinum skipar og leiðir arbeiðið hjá eftirlitinum. Formaðurin syrgir fyri, at avgerðir hjá eftirlitinum verða almannakunngjørdar og útintar. Formaðurin undirskrivar avgerðir hjá eftirlitinum.

**Kapittul 9**
**Fundir og atkvøðureglur í Grannskoðaraeftirlitinum**

**§ 5.** Formaðurin leiðir fundirnar í Grannskoðaraeftirlitinum.
*Stk. 2.* Formaðurin ásetir fundartíð og -stað. Fundur verður annars hildin, tá 3 limir ella Skráseting Føroya setir fram ynski um fund til at viðgera nærri tilskilaðar spurningar. Einstaki limurin kann biðja um, at eitt mál verður sett á fundarskrá til fund í eftirlitinum.
*Stk. 3.* Limir verða kallaðir inn til fund við í minsta lagi 7 daga freist, uttan so at formaðurin tekur aðra avgerð.
*Stk. 4.* Saman við fundarinnkallingini skal fylgja ein fundarskrá við teimum málum, sum skulu viðgerast. Tað tilfar, ið er neyðugt fyri at viðgera málini, skal helst vera viðlagt fundarskránni.
*Stk. 5.* Mál, sum ikki eru komin á fundarskrá, kunnu verða viðgjørd á fundinum, um í minsta lagi 5 limir góðkenna tað, ella formaðurin, tá málið hevur skund, tekur avgerð um hetta.
*Stk. 6.* Skráseting Føroya kann leggja mál fyri eftirlitið. Harumframt kann Skráseting Føroya krevja, at eitt evni kemur á fundarskrá til næsta fund hjá eftirlitinum.

**§ 6.** Limir, ið ikki fáa møtt á fundi, skulu skjótast gjørligt geva skrivstovuni hjá eftirlitinum boð um hetta.

**§ 7.** Umboð fyri **s**krivstovuna luttekur á fundum hjá eftirlitinum.
*Stk. 2.* Formaðurin kann loyva øðrum at luttaka í ávísum málum, sum eru á skránni.

**§ 8.** Fundirnir hjá Grannskoðaraeftirlitinum eru ikki almennir.

**§ 9.** Eftirlitið er viðtøkuført, tá í minsta lagi helvtin av limunum eru til staðar undir viðgerðini av málinum.
*Stk. 2.* Eftirlitið tekur avgerð við vanligum atkvøðumeiriluta millum teir møttu limirnar. Stendur á jøvnum í atkvøðum, er atkvøðan hjá formanninum avgerandi.
*Stk. 3.* Tá eftirlitið viðger ávís mál, skulu umframt formannin í minsta lagi luttaka líka nógv umboð fyri roknskaparbrúkararnar sum grannskoðarar. Í málum viðvíkjandi løggildum grannskoðarum ella grannskoðanarvirkjum skal í minsta lagi ein løggildur grannskoðari luttaka. Í málum viðvíkjandi skrásettum grannskoðarum ella grannskoðanarvirkjum skal í minsta lagi ein skrásettur grannskoðari luttaka.

**§ 10.** Formaðurin syrgir fyri, at samráðingar og avgerðir hjá eftirlitinum verða førdar í fundarbók.
*Stk. 2.* Í fundarbókini skal standa, hvørjir limir hava verið á fundi. Limur kann krevja sínar viðmerkingar skrivaðar í fundarbókina.
*Stk. 3.* Skrivstovan hjá eftirlitinum ger eina frásøgn frá fundum í eftirlitinum, sum eftir at hava fingið formansins góðkenning, verður send limunum. Limirnir skulu helst senda møguligar viðmerkingar til skrivstovuna, eftir at hava móttikið frásøgnina, men kunnu tó koma við viðmerkingum til frásøgnina á næstkomandi fundi.
*Stk. 4.* Limir, sum luttaka á fundi, skulu undirskriva fundarfrásøgnina.
S*tk. 5.* Grannskoðaraeftirlitið kann taka avgerð um, at fundarbókin skal vera talgild, og at møguligar

viðmerkingar skulu gerast talgilt, smb. stk. 1 og 2. Harumframt kann eftirlitið avgera, at fundarfrásøgnin skal sendast limunum talgilt, at limirnir gera viðmerkingar talgilt, og at frásøgnin skal góðkennast við talgildari undirskrift, smb. stk. 3 og 4.

## Kapittul 4
## Gegni

**§ 11.** Limirnir í Grannskoðaraeftirlitinum eru undir somu reglum um gegni sum grannskoðarar, smb. § 17, stk. 1 í grannskoðaralógini.
*Stk. 2.* Limir hava skyldu til at boða eftirlitinum frá um umstøður, ið kunnu sáa iva um gegni hjá viðkomandi.
*Stk. 3.* Limir, sum hava kunnleika til slíkar umstøður annars, hava skyldu til at boða formanninum í eftirlitinum frá hesum.
*Stk. 4.* Grannskoðaraeftirlitið avger, uttan at viðkomandi limur luttekur, um viðkomandi er ógegnigur í málinum. Ein limur kann altíð sjálvur lýsa seg sum ógegnigan, smb. stk. 1.
*Stk. 5.* Tá ein limur hevur vikið sín sess, kann ein annar limur verða kallaður inn til viðgerðina og avgerðina í viðkomandi máli.

## Kapittul 5
## Tagnarskylda

**§ 12.** Formaðurin, limirnir, skrivstovan og onnur, sum luttaka á fundi í eftirlitinum hava, av umhugsni fyri teimum kannaðu grannskoðanarvirkjunum og teirra viðskiftafólki, tagnarskyldu eftir §§ 152, 152a, 152c-152f í revsilógini, smb. § 17, stk. 2 í grannskoðaralógini.
*Stk. 2.* Limur kann tó altíð umrøða mál, ið er partur av fundarskránni við ein annan lim, og útflýggja tilfar hesum viðvíkjandi til hansara.
*Stk. 3.* Formaðurin kann í serligum føri avgera, at skrivligt tilfar verður deilt út á fundinum, og síðani latið inn aftur, tá fundurin endar.

**§ 13.** Eftirlitið ger eina árliga frágreiðing um sítt virksemi. Frágreiðingin inniheldur samsvarandi ES tilmæli (2001/256/EF) m.a. úrslitini frá góðskueftirlitinum. Úrslitini kunnu almannakunngerast í hagfrøðiligum líki uttan at tilskila, hvørji grannskoðanarvirkini eru. Frágreiðingin verður eisini almannakunngjørd á heimasíðuni hjá Skráseting Føroya – www.skraseting.fo.

## Kapittul 6
## Gildiskoma

**§ 14.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Vinnumálaráðið tann 13. januar 2009

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/Arne Poulsen (sign.)

# Kunngerð
# um
# trygd og ábyrgdartrygging fyri løggildar og skrásettar grannskoðarar

Við heimild í § 3, stk. 2 í løgtingslóg nr. 116 frá 11. desember 2007 um løggildar og skrásettar grannskoðarar (grannskoðaralógin) verður ásett:

*Trygd*

**§ 1.** Tilnevning sum løggildur ella skrásettur grannskoðari er treytað av, at ein trygd verður veitt frá triðjamanni um, at viðkomandi sum sjálvskuldari svarar fyri teimum fíggjarligu krøvum, sum kunnu koma av at gera arbeiði sambært § 1, stk. 2 í grannskoðaralógini.
*Stk. 2.* Trygdin verður veitt eftir leisti, sum Skráseting Føroya ásetur.
*Stk. 3.* Trygdin skal skrásetast hjá Skráseting Føroya.

**§ 2.** Tryggjaði skal sambært innihaldinum í trygdini, smb. § 1, stk. 1, hava beinleiðis krav mótvegis tí, ið hevur veitt trygdina, og kann trygdin ikki avmarkast á annan hátt enn ásett er í hesi kunngerð.

**§ 3.** Trygdin skal veitast fyri krøvum, ið viðvíkja viðurskiftum frá tí degi at rokna, at trygdin fær gildi, og til trygdin fer úr gildi.
*Stk. 2.* Trygdin kann ikki fara úr gildi, fyrr enn tað er skrásett hjá Skráseting Føroya. Skrásetingin verður gjørd eftir áheitan frá tí, ið hevur veitt trygdina, og hevur virknað frá einum ávísum degi, tó í fyrsta lagi ein mánað eftir, at Skráseting Føroya hevur móttikið áheitanina. Um áheitanin er grundað á svik frá løggilda ella skrásetta grannskoðaranum, kann tann, ið hevur veitt trygdina, krevja, at trygdin verður sett úr gildi dagin eftir, at Skráseting Føroya hevur fingið áheitanina.
*Stk. 3.* Áheitanin um skráseting sbrt. stk. 2 verður gjørd eftir leisti, sum Skráseting Føroya ásetur.

**§ 4.** Trygdin kann peningaliga avmarkast soleiðis, at øll krøv í einum ári í tí tíðarskeiðinum, sum trygdin er galdandi fyri, bert verða rindað við einari ávísari upphædd, sum í minsta lagi skal vera 500.000 kr. fyri hvønn einstaka løggilda ella skrásetta grannskoðara.
*Stk. 2.* Upphæddin í stk. 1 verður ikki lækkað, hóast ábyrgdin bert er galdandi styttri enn 1 ár.

**§ 5.** Trygdin kann tíðaravmarkast, soleiðis at hon bert er galdandi fyri krøv, sum verða reist ímóti tí, ið hevur veitt trygdina í seinasta lagi 5 ár eftir, at uppgávan ella viðurskiftini, sum kravið er grundað á, er endað.
*Stk. 2.* Freistin í stk. 1 verður frestað, um tryggjaði førir rættarsókn mótvegis grannskoðaranum, undir hesum tá klaga er latin Dissiplinernevndini fyri løggildar og skrásettar grannskoðarar.

**§ 6.** Trygdin kann avmarkast í mun til ta í § 8 nevndu ábyrgdartrygging, soleiðis at trygdin ikki er galdandi fyri krøv, sum ikki verða rindað av ábyrgdartryggingini, og orsøkin til hetta einans er avmarking í peningaupphæddini í ábyrgdartryggingini.

**§ 7.** Tann, sum veitir trygdina, skal vera eitt tryggingarfelag, ein peningastovnur ella annar fíggingarstovnur, hvørs trygd hevur við sær eins góða trygd.
*Stk. 2.* Tryggingarviðurskiftini verða reguleráð í føroyskari lóggávu. Rættarmál viðvíkjandi trygdini skulu leggjast fyri Føroya Rætt.
*Stk. 3.* Um trygdin fyri tann einstaka grannskoðaran er stovnsett sum ein liður í einari heildarskipan galdandi fyri fleiri grannskoðarar, kann tann, ið veitir trygdina, vera ein sjálvstøðugur grunnur ella felag. Hetta er tó treytað av, at tilsøgnin frá grunninum ella felagnum er so mikið greið, at Skráseting Føroya út frá einari ítøkiligari meting metur, at grunnurin ella felagið til eina og hvørja tíð setur tilsvarandi trygd sum eftir stk. 1.

*Ábyrgdartrygging*

**§ 8.** Tilnevning sum løggildur ella skrásettur grannskoðari er treytað av, at eitt tryggingarfelag váttar, at viðkomandi grannskoðari hevur eina ábyrgdartrygging, og at tryggingarfelagið heftir beinleiðis mótvegis honum, sum hevur verið fyri skaða, orsakað av, at løggildi ella skrásetti grannskoðarin kemur undir endurgjaldsábyrgd, sum stendst av minni ósketni grannskoðarans ella øðrum, sum hann heftir fyri, í sambandi við at loysa uppgávur sbrt. § 1, stk. 2 í grannskoðaralógini.
*Stk. 2.* Á virkjum, smb. § 12, stk. 1 í grannskoðaralógini, sum hava 10 ella fleiri løggildar ella skrásettar grannskoðarar, skal ábyrgdartryggingin eftir stk. 1 hava eina samlaða tryggingarupphædd, sum í minsta lagi er 20 mió. kr. fyri hvørt tryggingarár.
*Stk. 3.* Á øðrum virkjum, smb. § 12, stk. 1 í grannskoðaralógini skal ábyrgdartryggingin sbrt. stk. 1 samanlagt hava eina tryggingarupphædd á í minsta lagi áljóðandi 2 mió. kr. fyri hvørt tryggingarár faldað við samlaða talinum av løggildum og skrásettum grannskoðarum í felagnum, tó smb. stk. 4.
*Stk. 4.* Á virkjum, smb. § 12, stk. 1 í grannskoðaralógini, sum hava færri enn 6 løggildar ella skrásettar grannskoðarar, kann ábyrgdartryggingin sbrt. stk. 1 vera uttan samanhópan av tryggingarupphæddini og við eini tryggingarupphædd á í minsta lagi áljóðandi 2 mió. kr. fyri hvørt tryggingarár og fyri hvønn løggildan ella skrásettan grannskoðara. Hetta er hægsta tryggingarupphædd, sum tryggingarfelagið skal gjalda fyri ein einstakan skaða, sjálvt um fleiri

løggildir ella skrásettir grannskoðarar hava ábyrgd av skaðanum.
*Stk. 5.* Váttanin verður gjørd eftir leisti, sum Skráseting Føroya ásetur.
*Stk.* 6. Váttanin skal skrásetast hjá Skráseting Føroya.

**§ 9.** Er ábyrgdartryggingin sbrt. § 8, stk. 1 fyri hvønn einstaka grannskoðara stovnað sum liður í einari kollektivari skipan, sum fevnir um fleiri grannskoðaravirkir og fleiri enn 9 grannskoðarar, skal ábyrgdartryggingin hava eina samlaða tryggingarupphædd, sum í minsta lagi er áljóðandi 20 mió. kr. fyri hvørt tryggingarár. Tað er ein treyt fyri at stovna eina kollektiva ábyrgdartrygging, at tryggingin veitir fulnað fyri, at tryggingarupphæddin verður endurstovnað í teimum førum, har upphæddin er brúkt, orsakað av einum ella fleiri skaðum í einum tryggingarári.

**§ 10.** Ein ábyrgdartrygging kann bert verða sett úr gildi, tá hetta er skrásett hjá Skráseting Føroya. Skrásetingin fer fram eftir áheitan frá tryggingarfelagnum við virknaði frá einum ávísum degi, tó í fyrsta lagi ein mánað eftir, at Skráseting Føroya hevur móttikið áheitanina.
*Stk. 2.* Áheitanin um skráseting sambært stk. 1 verður gjørd eftir leisti, sum Skráseting Føroya ásetur.

**§ 11.** Tryggingarviðurskiftini verða regulerað í føroyskari lóggávu. Rættarmál viðvíkjandi ábyrgdartryggingini skulu leggjast fyri Føroya Rætt.

*Gildiskoma v.m.*

**§ 12.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Tryggingaravtalur (ábyrgd og ábyrgdartryggingar), ið eru gjørdar, áðrenn henda kunngerð kemur í gildi, eru galdandi inntil tær sambært tryggingartreytunum kunnu verða settar úr gildi, tó í mesta lagi fram til tann 1. januar 2010.

Vinnumálaráðið, 14. januar 2009

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/Arne Poulsen (sign.)

FØROYAPRENT